# Bilar

Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo



# Prins Joachim í Bilradio

## Hósdagin 26. august kl. 16.10

Í sendingini Bilradio á Rás2 hósdagin 26. august kl. 16.10 verður vitjað á Copenhagen Historic Grand Prix 2010 í Fælledparken í Keypmannahavn.

Nógv varð gjørt burturúr at 100 ár eru liðin síðan italska Alfa Romeo bilverksmiðjan varð stovnað. Í hesum sambandi eru samrøður við Steffen Holm, sum er tíðindastjóri hjá Alfa Romeo og við Henrik Henriksen, sum eigur ein flottan Alfa Romeo frá 1949.

Eisini er samrøða við Prins Joachim frá Cortina Racing Team, sum koyrdi kapp við sínum 45 ára gamla Ford Lotus Cortina. Vitjað verður á Mercedes framsýningini og prátað verður við Folmer Larsen, sum hevur ein Mercedes-Benz frá 1951. Folmer Larsen hevur átt onkran Mercedes, sum koyrir í Føroyum í dag. Samrøða er eisini við ein av fyrireikarunum av tiltakinum, Lars Scheving, sum var tíðindastjóri á Copenhagen Historic Grand Prix 2010.

Í sendingini er eisini samrøða við Jákup á Borg um nýggju klárgeringarhøllina hjá Bilrøkt í Stiðjagøtu í Havn.





*Steffen Holm er tíðindastjóri hjá Alfa Romeo*



*Henrik Henriksen eigur ein flottan Alfa Romeo frá 1949*



*Folmer Larsen hevur átt onkran Mercedes, sum koyrir í Føroyum í dag*



*Lars Scheving var tíðindastjóri á Copenhagen Historic Grand Prix 2010*

# Bilrøkt yvi

Bilfyritøkan Bilrøkt í Havn hevur fingið ein flutningsbil afturat í flotan. Talan er um Scania flutningsbilin hjá Bilhjálp.fo á Skála, sum hevur røkt flutningsuppgávur í Eysturoynni og har á leið.

Jákup á Borg, stjóri í Bilrøkt, sigur, at teir við hesum bilinum eru enn betur útgjørdir til flutningsuppgávur kring alt landið. Nú hava vit flutningsbilar í fleiri støddum, sum kunnu nýtast til tær ymisku flutningsuppgávurnar.

Í sambandi við at fyritøkan fyllir fimm ár og ein nýggj klárgeringarhøll varð tikin í nýtslu, var opið hús og móttøka hjá Bilrøkt leygardagin.



*Flutningsbilurin hjá Bilhjálp.fo er nú komin afturat í flotan hjá Bilrøkt*